# Mugu svara aftur

Ein av føroysku leikarunum, sum ofta var í hornatøkum við norsku mótstøðumenninar var Hans Áki Dal-Christiansen.

Í álopspartinum fekk hann fleiri ferðir kærleikan at kenna frá beinleiðis mótstøðumanni sínum, og í verjupartinum var tað serliga norski strikuspælarin, sum tóktist strævin at fáast við. Hetta gav úrslit í nógvum og hørðum nærdystum, men hetta tóktist tó ikki vera nakað, sum nervaði Kyndils-leikaran.

– Tú ert eisni noyddir til at taka slíkar nærdystir. Gevur tú ikki av somu skuffu, so missur tú skjótt takið, og so er slagið tapt. Teir royndu eisini at kysa okkum niður, og eina løtu haldi eg, at tað eydnaðist hjá teimum, soleiðis at vit fóru niður við nakkanum. Tað hevur man ikki ráð til í slíkum dystum, og vit mugu læra okkum at tveita virðingina burtur í slíkum førum. Tað dugdu vit ikki nóg væl hesaferð, men tað er so nakað, sum vit mugu læra okkum, helt Hans Áki eftir dystin.



*Tað gjørdist til nógvar og harðar nærdystir hjá Hans Áka Dal-Christiansen leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Føroyar-Noreg 24-37 (8-20):

# Klassi í lítlan hálvleik

**Ein fittan part av fyrra hálvleiki sýndi norska landsliðið, hvussu stórur styrkismunurin í veruleikanum var, men tá ferðin so varð sett nakað niður, fingu áskoðaranrir hóast alt ein undirhaldandi seinna hálvleik at síggja**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Føroysku leikararnir stríddust allan dystin av øllum alvi, og teir eiga rós fyri hendan partin av spælinum, tó at tað ikki var nóg mikið at steðga norska yvirvaldinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ítróttarhøllin á Hálsi var staðið, har mann skuldi verða sæddur leygardagin.

Tað man í øllum førum vera heilt langt síðani, at áhugin fyri einum hondbóltsdysti her á landi hevur verið somikið stórur, og eftir bert hálvum tíma vóru fyrstu 500 atgongumerkini seld, so tað stóð skjótt greitt, at høllin fór at verða stúgvandi full av fólki. Við fyrstu regluni verður eisini sipað til, at hetta samstundis var eitt sera gott høvi hjá teimum, sum vilja síggjast, og tað man ikki vera heilt av leið at gita, at stórur partur av uppstillaðu valevnunum í Suðurstreymoy vóru til staðar. Onkur teirra enntá við faldarum við persónligu valskránni.

## Revsaðu – hvørja ferð

Tað var tó hondbólturin, sum fólk vóru komin at síggja. Ein av sterkastu hondbóltstjóðunum í løtuni var komin á vitjan, og tó at tað neyvan mundi vera nakar sum droymdi um veruligan spenning í dystinum, so er tað ikki á hvørjum degi, at høvi er at síggja slíkar leikarar live.

Tað stóð eisini skjótt greitt, at styrkismunurin millum liðini bæði var øgiligur. Kanska ikki tað allar fyrstu løtuna, tá norska liðið byrjaði á sama hátt, sum teir gjørdu tað í Noreg. Við eini flataru verju heilt inni móti strikuni, so okkara eisini fingu høvi at royna seg. Eitt høvi, sum menninir nýttu til at fylgja við norska liðnum, til bæði liðini høvdu fingið sær tvey mál hvør, men so var eisini liðugt.

Næsta góða korterið ella har á leið fingu okkara menn nevnliga eina sanna lektión í, hvussu hondbóltur verður leiktur, tá hann er mest effektivur. Formatiónin í norsku verjunin var framvegis hin sama, men hon varð - øll sum hon var - skotin einar tveir metrar útfrá, og hóast hetta skuldi givið okkara monnum nakað betri pláss at bróta ígjøgnum, so var snøgt sagt ikki møguleiki til tess. Ístaðin gjørdist talan ofta um nølandi spæl og skotroyndir úr torførum støðum, og so fall revsingin. Og hon fall hvørja ferð. So skjótt sum eitt føroyskt skot var latið av, stungu norsku vongspælararnir avstað, og so kundu áskoðararnir bara hyggja at, hvussu ein sending skal vera í kontrafasuni. Hjá norsku vengrunum var bara at renna við hondunum frammi, tí bólturin kom hvørja ferð í beinari linju beint í hondina á monnunum, og einsamallir við málverjanum sviku teir ikki.

## Sveinur lyfti avrikið

Flestu av áskoðarunum mundu hesa løtuna óttast, at Føroyar skuldu gerast offur fyri sannari avhølving, og høvdu norsku leikararnir megna at hildið støðinum, so er einki at ivast í, at hetta hevði verið úrslitið, men tíbetur fyri okkara, so hendi tað ikki.

Ístaðin kom so vælkenda støðan aftur, har lðiið setir ferðina nakað niður, tá sigurin kortini tykist vísur, og so var tað, at okkara av álvara sluppu upp í part.

Fyri steðgin gav Sveinur Justinussen føroyska liðnum eina vón um, at tað hóast alt mundi bera til at gera ein góðan figur, og sami Sveinur var eisni maðurin, sum í seinna hálvleiki staðfesti, at hóast føroyska liðið kanska ikki telist millum tey bestu í heiminum, so hava vit einstakar leikarar, sum hava eina øgiliga skotstyrki.

Ferð eftir ferð í seinna hálvleiki staðfesti hann, at hann í serflokki er tann føroyski leikarin, sum vit kunnu rokna okkum mest av í framtíðini, og tað er einki at siga til, um hann eftir dystin iðraði seg um, at hesin ikki varð vístur beinleiðis í norskum sjónvarpi. Norsku VIP'ararnir sótu beint aftan fyri føroysku fjølmiðlarnir, og har varð fleiri ferðir tutlað hálvgum hart í seinna hálvleiki, so tað skuldi verið løgið, um telefonin inni á Skála ikki fer at kima onkran dagin við fyrispurningum um, hvørt ungi leikarin hevur hug at koma inn á meginlandið at royna hondbóltsevnini.

## Mugu bara læra

Sammett við norsku mótstøðuna, so fekk tó heldur ikki Sveinur gjørt so øgiliga nógv við, hvussu dysturin spældi av. Føroyar fingu snøgt sagt eina lítla uppvísing í, hvussu einfalt, skjótt og effektivt hondbóltur í veruleikanum kann spælast, og tó at normenn ongan tíð fóru at spæla fyri gallarínum, soleiðiðis sum onkur kanska hevði vónað, so vóru í løtum detaljur, sum vit sjáldan síggja her heima. Eitt nú Kristian Kjelling sendi Halgir somikið væl av við eini fótfintu, at hoyvíkingurin ikki bara varð tikin á skeiva beininum, men veruliga traðkaði til síðuna, soleiðis at normaðurin ístaðin bara rann beint fram inn á strikuna og smekkaði til.

Men hóast yvirmaktina, so mundi føroyska liðið hóast fáa sær ein lærupening úr dystinum. At vit kropsliga eru væl aftan fyri altjóða mótstøðuliðini er ein veikleiki, sum tað hevur verið arbeitt við nú í eina tíð, og enn er nakað væl eftir, áðrenn komið er á mál við hesum. Men tann parturin er tó betraður.

Hinvegin stendur eitt sindur verri til við breiddini í føroyska spælinum. Á bakplássunum hava vit skjúttar, sum væl kunnu standa seg í altjóða kappingum, og sum veruliga kunnu leggja trýst á, fáa teir bara eitt lítið sindur av plássi.

Hinvegin tykist støðan við vongspælinum ikki vera heilt so góð. Ella kanska skuldi verið skrivað, at hesir ikki fingu møguleikan at royna seg. Fyri ein ovurstóran part, so varð føroyska spælið nevnliga kroyst inn móti miðjuni, har skotsterku bakspælararnir skuldu taka sær av restini, men tað gjørdi samstundis uppgávuna hjá mótstøðuverjuni munandi léttari. Megnar føroyska liðið í størri mun at gerast ein hóttan av vongplássunum, so gevur tað alt fyri eitt enn meira pláss til hinar, tá spælið verður tambað til síðurnar, hendir tað, so er einki at ivast í, at vit í størri mun kunnu gerast ein hóttan. Kanska ikki móti Noreg, men tað er so ikki hvønn dag, at vit spæla móti teimum. Slíka mótstøðu fáa vit kanska bert eina ferð fyri hvørt tíggjuáraskeiðið, og tá kunnu vit ikki gera annað enn at njóta upplivingina. Tað gjørdu eisini bæði leikarar og áskoðarar leygardagin.

## Effektivitetur

Tað er einki at siga til, at norsku leikararnir sýndu ein væl størri effektivitet enn teir føroysku, men eftir steðgin megnaðu okkara tó at fáa bæði fleiri skotroynir og betri nýtslu av hesm, enn teir gjørdu í fyrra hálvleiki. Hagtølini fyri hetta vóru sum fylgjandi:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **1. hálvleikur** | | | |
| Føroyar | 22 skot | 8 mál | 36% |
| Noreg | 29 skot | 20 mál | 67% |
| **2. hálvleikur** | | | |
| Føroyar | 27 skot | 15 mál | 56% |
| Noreg | 24 skot | 16 mál | 67% |



# Føroyska hetjan

**Sveinur Justinussen var maðurin í fokus eftir landsdystin leygardagin, og einki er at ivast í, at fleiri norskir venjarar munnu fara at skriva sær navn hansara aftan fyri oyra**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einki er at ivast í, hvør leikarin var stóra samrøðuevnið eftir landsdystin leygardagin.

Vanliga er tað so, at fjølmiðlarnir at kalla býtast – og ikki bítast – um at fáa orðið á ymsu leikararnar, men hesaferð var støðan tó eitt lítið sindur øðrvísi.

Sveinur Justinussen var fram um hinar maðurin, sum miðlarnir skuldu hava orðið á, og feðr eftir ferð mátti hann soleiðis standa og svara mest sum somu spurningum um júst lidna dystin. Ein dystur, sum Sveinur annars ikki var heilt so væl nøgdur um sjálvur, um sammett verður við dystin í Noreg.

– Í dag brenni eg ov nógvar møguleikar. Serliga í fyrra hálvleiki, meðan tað hinvegin gongur væl og virðiliga upp eftir steðgin, heldur hann lítillátin fyri.

– Men hvat. Av og á, so mást tú brenna, og steðgar tú at skjóta av teirri orsøk, so koma nokk ikki so nógv mál burturúr.

## Kostaði nógv

Stóran part av dystinum var leiklutrin hjá Sveini bara í álopspartinum, og sjálvur ásannaði hann eisini eftir dystin, at hesum hevði hann so einki havt ímóti.

– Tað kostar ótrúliga nógv at fara inn móti leikarum, sum eru somikið væl fyri kropsliga. Tú merkir veruliga, at hatta eru menn, sum venja við vektum hvørja tí einastu viku, og hvørja ferð farði varð inn til eina skotroynd, varð kroppurin mest sum pumpaður tómur. So steðgirnir hjá mær vóru neyðugir.

Um dystin sjálvan helt Sveinur annars, at hann mundi vera á eini leið, tó at hann sjálvsagt ásannar, at mótstøðan var dekan ov sterk.

– Í seinna hálvleiki fáa spælið hjá okkum at ganga so nøkunlunda, og tað haldi eg, at vit kunnu vera nøgdir um. Hinvegin má tað ikki henda, at vit fara niður við høvdinum. Tað gera vit eina løtu í fyrra hálvleiki, og tá verða vit revsaðir 100% alt fyri eitt, so tað má ikki henda. Heldur ikki hóast tað viðhvørt kann síggja nóg so høpisleyst út móti somikið sterkum liðum.

## Skúlan fyrst

Eftir teir báðar landsdystirnar móti Noreg er einki at ivast í, at í øllum førum hondbóltskønir normenn munnu hava bitið sær merki í navni á unga manninum av Skála, men sjálvur tykist Sveinur tó at taka hetta eins róligt, sum hann altíð hevur gjørt, og enn er telefonin so heldur ikki farin at kima.

– Í løtuni fari eg so ongan veg. Eg ætli mær fyrst at gera meg lidnan við útbúgvingina, men so kundi tað væl hent seg, at eg fari at royna meg aðrastaðni. Tað er jú nærliggjandi, at eg kundi fari til Danmarkar at lesa, og geri eg tað, so fari eg eisini at spæla hondbólt, sigur hann. Og hann ivast ikki í, at skal menningin standa við, so verður tørvur á nýggjum avbjóðingum.

– Tað sigur seg sjálvt, at spælir tú á einum góðum donskum liði, so verður tú betri fyri. Tað hava vit sæð hjá teimum leikarum, sum hava roynt seg uttanlands, og ikki minst veðrur kropsliga venjingarstøðan munandi betri, heldur Sveinur.

Men alt hetta tykist hann tó ikki hugsa so nógv um enn. Fyri framman standa tveir dystir á útivølli móti Rumenia, og síðani verður tað StÍF og stríðið fyri at endurvinna FM, sum fer at standa ovast á breddanum, og har verður Sveinur uttan iva ein av avgjørdu lyklaleikarunum.



*- Tú merkir veruliga, at hatta eru menn, sum venja við vektum hvørja tí einastu viku, og hvørja ferð farði varð inn til eina skotroynd, varð kroppurin mest sum pumpaður tómur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*